Leikrit



# Lítli Gutti

stytt útgáva á síðu 9

Landsmiðstøðin

## Lítli Gutti

Leikhúsjól 1997
Katarina Nolsøe skipaði til leik eftir søgu hjá Marius Johannesen.

## Leikarar:

Gutti
Mikkjal
Flykra
Gabriel

*1.*

*Einglarnir koma inn á rað, teskandi - sum í lusiugongu.*

*Við eitt leggja teir merki til, at Lítli Gutti ikki er við. Allir steðga og bíða eftir honum*

*At enda kemur Gutti bóltandi inn. Mikkjal rættar gloriuna og veingirnar hjá Gutta.*

Abbin: Nú er jólahøgtíðin í hondum, og vit mugu allir hjálpast at við at gera Himmalin so vakran sum gjørligt. Skúrið perlugøtuna, so at ikki so mikið sum eitt einglahár sæst.

*Einglarnir fara til verka. Lítli Gutti roynir at hjálpa til, men tað miseydnast og verður hann tí stillisliga koyrdur til viks.*

*Einglarnir halda fram at arbeiða, men Gutti fer keddur fram á forpallin.*

2.

*Ein kavaflykra kemur bóltandi inn og rennur á Gutta.*

Flykran: Er tú ein eingil?

Gutti: Ja, eg eiti Lítli Gutti. Hvør ert tú?

Flykran: Ánei, aftur vilstur! Eg eri Hvirla kavaflykra, og eg átti at verið lend á jørðini saman við hinum flykrunum, men so viltist eg og fór skeivan veg! Uppeftir í staðin fyri niðureftir. Eg villist altíð!

Gutti: Á, so ert tú sum eg, meðni . . . !

Flykran: Hví tað? Hvat feilar tær?

Gutti: Eg líkist einki hinum einglunum. Teir ganga so erpnir og duga so væl, meðan eg bara detti um mínar egnu føtur. Glorian

stendur altíð skeiv, og veingirnir bara fløkjast. Eg royni, hvat eg kann, men einki ber til!

Flykran: Tað er nakað tvætl: Alt ber til - bara mann vil.!!

3.

*Aftanfyri tey er Mikkjal komin inn og blæsur í klarinett. Hann hyggur, um Perlugøtan er rein.*

Mikkjal: Kórvenjing! . . . . . Kóóóóórvenjiiiing!

*Einglarnir stilla upp og byrja at murra.*

Flykran: Til dømis syngja - dugir tú ikki at syngja?

Gutti:

Eg elski at syngja!!! . . . men eg dugi ikki . . . !

Flykran: Tvætl!!

*Flykran skumpar Gutta yvir til kórið. Hann fer uppí, men tá hann letur munnin upp, tagna allir hinir og hyggja at honum. At enda rýma teir allir.*

4.

*Einglarnir koma inn tosandi sínámillum.*

Gutti: Nú fara teir at stákast til jóla - og eingin biður meg koma at hjálpa sær.

*Klarinettspæl.*

Flykran: Ha?? Hvat duga teir, sum tú ikki dugir??

Gutti: Teir turka skýggini, so tey gerast sum ull.

*Einglarnir arbeiða aftanfyri. Mikkjal spælir klarinett.*

Flykran: Ja, tað var akkurát nakað fyri teg! Okkurt mást tú duga!!

*Gutti roynir, men tað miseydnast. Hann er púra niðurundirkomin og grætur. Mikkjal sendir hinar einglarnar út.*

Mikkjal: So, so, Gutti góði. Einglar eru fittir og góðir, og tað ert tú eisini.

*Mikkjal fer, gutti og Flykran sita eftir.*

6.

Gutti: Huff!! Ja, men eg vildi so fegin duga okkurt.

Flykran: Sig mær: Arbeiða einglar altíð?

*Í somu løtu koma einglarnir spælandi inn. Teir taka Gutta uppí, men tað miseydnast aftur hjá honum. Einglarnir fara, og Gutti og flykran setast aftur.*

7.

Flykran: Nei, mín sann!! Hetta ber ikki til! Eingin er so ringur, at hann ikki dugir til okkurt!

*Eingilin Gabriel kemur við eini kurv við stjørnum. Hann hyggur seg í kring eftir hinum einglunum, men sær ikki Lítla Gutta og flykruna.*

Gabriel: Hvar eru allir? Tað verður skjótt myrkt! Onkur má hjálpa mær at heingja stjørnurnar upp!

Flykran: Hatta er júst tú! Skunda tær nú!

Gutti: Nei! Hann vil ikki!

Flykran: Tvætl!!

*Flykran fer til Gabriel, sum sóknast eftir hinum einglunum. Hon fær gjørt hann varugan við lítla Gutta.*

Gabriel: Lítli Gutti! Hvussu hevði tær dámað at hongt stjørnurnar út í kvøld?

Gutti: Eeeg??!

Gabriel: Ja, tú og eingin annar.

Gutti: Allar samlar?

Gabriel: Ja, allar samlar. Nú hevur tú sæð meg heingja tær út fleiri hundrað ferðir, so nú eigur tú at vita, hvar hvør skal hanga.

*Gutti fer glaður til verka, men missir kurvina. Í somu løtu koma tríggir aðrir einglar rennandi, klappa Gutta á høvdið, taka allar stjørnurnar upp og fara út við teimum. Gabriel fer aftaná teimum.*

Gabriel:

Minst til at heingja Karlsvogning rætt, og Norðstjørnan skal vera norðanfyri og Aldubáran . . .

*Gutti og flykran sita vónbrotin eftir. Mikkjal kemur inn. Gutti og Flykran síggja hann ikki.*

Flykran: Ja, ja, Gutti! Tú gjørdi tað, tú kundi. Tú hevur ein góðan vilja, og tað er tað, sum telur. Eg fái ikki hjálpt tær meira. Eg skuldi eisini verið í einum stórkavagildi í morgin, so eg noyðist at sleppa mær avstað. Tað var synd - hevði tað bara verið *ein* stjørna.

Gutti: Ja, ein stjørna.

*Mikkjal hoyrir tey og fær eitt hugskot.*

Mikkjal: Lítli Gutti!! Hvat hevði tær dámað at sloppið at hongt *eina* stjørnu út í kvøld?

Gutti: Men hevur tú longu gloymt, at eg stoytti allar stjørnurnar út um himmalin í áðni? Hevur tú gloymt tað?

Mikkjal: Nei, einki havi eg gloymt tað, men kanska vóru allar hasar stjørnurnar ov tungar fyri teg. Nú skalt tú sleppa at heingja eina serliga stjørnu í kvøld. Tað er jólastjørnan!

*Gutti er púra ovfarin. Mikkjal tekur jólastjørnuna fram og gevur Gutta.*

Gutti: Hon er slett ikki tung! Hon er næstan so løtt sum ein fjøður.

*Lítli Gutti heingir jólastjørnuna upp, meðan allir hinir einglarnir hyggja at. Allir einglarnir hyggja at. Allir einglarnir klappa av frøi. Teir syngja fyri Gutta og vagga honum á einum hvítum skýggi, so hann sovnar. Síðan ganga teir út á sama hátt, sum teir komu inn í byrjanini.*

| | |
|---|---|
| Flykran: | Hvat gjørdi so tað, at lítli Gutti snávaði um sínar egnu føtur og fór fram eftir rommum? Hann hevur hongt upp jólastjørnuna, og tað ber av øllum! Tá jólini koma, far tá út og hygg, har sum jólastjørnan eigur at vera. Hygg nú leingi og væl. Mestur fært tú eyga á Lítla Gutta, sum varisliga heingir út jólastjørnuna. |

*Liðugt.*

## Lítli Gutti

Stytt útgáva

## Leikarar:

Gutti
Mikkjal
Eingil 1
Eingil 2
Eingil 3
Eingil 4
Eingil 5

*Vit síggja himmalin og einglar. Gutti kemur inn stetlandi og snávandi í ringum hýri. Einglarnir bresta skýggj, skúra perlugøtuna, pussa stjørnurnar - eisini Gutti.*

1. eingil: Sum tað er stuttligt at bresta skýggj.

2. eingil: Ja, regnið rennur úr teimum. Tað gleðir summi, men í Føroyum halda tey, at tað regnar í meira lagi.

Gutti: (við grátirødd) Eg fái onga vætu burturúr, tá ið eg bresti skýggj.

3. eingil: Royn aftur.

Gutti: Tað nyttar einki.

4. eingil: Legg tú einki í tað. So sleppur tú frá at gera tað arbeiðið

Gutti: Nú fari eg at pussa eina stjørnu. Hvussu gert tú?

5. eingil: Hygg!! Tú skalt pussa leingi og títt.

Gutti: (roynir) Hetta dugi eg heldur ikki. Og í gjár royndi eg at skúra perlugøtuna. Men heldur ikki tað dugi eg (grætur).

Mikkjal: (uggar Gutta) Legg einki í, um tú ikki dugir hatta enn. Hinir eru størri enn tú, so bíða bara.

Gutti: Men eg dugi einki.

Mikkjal: Bíða nú. Kom, so fara vit at lurta eftir kórsanginum hjá einglunum.

*Teir fara, og vit síggja og hoyra einglakórið. Gutti lurtar og byrjar at murra við og fer knappliga at syngja við - hart og slett ikki á tónanum. Kórið tagnar, og einglarnir hyggja at honum.*

Gutti: (við Mikkjal) Eg vildi bara sleppa at syngja við, og hygg, nú spilti eg alt. Eg dugi einki - eg bara spilli alt og geri mistøk.

Mikkjal: Einki skalt tú hugsa um tað. Tú ert fittur - og hevur ikki varnast, hvussu góðir allir einglarnir eru við teg.

Gutti: Jú, tað eru teir, men . . . .

Mikkjal: Hoyr meg, Gutti góði. Hvussu hevði tær dámt at sloppið at hongt upp stjørnurnar í kvøld?

Gutti: (ovfarin) Eeeeg???

Mikkjal: Ja, tú!!!

Gutti: Allar samlar?

Mikkjal: Ja, allar samlar. Nú hevur tú sæð meg hongt tær út fleiri hundrað ferðir, so nú eigur tú at vita, hvar hvør teirra eigur at hanga.

*Tað myrknar á pallinum, og Gutti er á veg upp í stigan við fullari stjørnukurv. Hann missir kurvina, og stjørnurnar bólta út á gólvið.*

Gutti: (rópar við) Á, hygg nú, hvat eg gjørdi!!

Mikkjal: Legg einki í hatta. Eg fái tær skjótt á rætt pláss. Bíða bara.

Gutti: Men hví miseydnast alt hjá mær??

*Einglarnir stákast til jóla. Eingin biður Gutta hjálpa.*

Mikkjal: Gutti, kanst tú hjálpa mær?

Gutti: Ha, eg??

Mikkjal: Ja, tú!!

Gutti: Men . . . men, hevur tú gloymt, hvussu gekst, tá ið eg skuldi heingja stjørnurnar út hitt kvøldið?

Mikkjal: Nei, tað havi eg ikki gloymt, men tær vóru alt ov tungar hjá tær at bera allar í senn. Hvussu hevði tær dámt at hongt upp jóla-stjørnuna?

Gutti: Jólastjørnuna? Jú, tað vil eg fegin, um tú heldur meg duga tað!

Gutti: (í stiganum) Eg kláraði tað!!!

Einglarnir: Hurrá, hurrá, hurrá!!

*Liðugt.*